tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 156 Fríggjadagur 16. august 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## SÚSANNA LØGTINGS-STJÓRI



**Formansskapurin í løgtinginum hevur sett Súsonnu Danielsen sum stjóra á Løgtingsskrivstovuni.**

*Síða 14*

## LØGMAÐUR Á VITJAN Í LOPRA



*Síða 6-7-8*

**Fiskidagar í hálvantriðja mánað:**

# Fleiri hundrað tons av toski fara óvirkað av landinum

Meiri enn helmingurin av toskinum, sum í løtuni verður veiddur í føroyskum sjógvi, endar á útlendskum fiskauppboðssølum. Føroysku virkjunum vantar ráðvøru

***Síða 8***




*Ein vanlig sjón. Fiskakassar við nøvnunum á útlendskum fiskakeyparum umborð á føroyskum skipum. (Mynd: Jan Müller)*

*Annfinn Kallsberg:*

## Skattalætti altíð góður

*Jóannes Eidesgaard:*

## Veldst um prísin

***Síðurnar 5 & 10***

**Stórt FRÆNDUR-kvøld**



**verður í ÍTRÓTTAR-HØLLINI Á HÁLSI**
**Leygarkvøldið 17. august**
**kl. 23.00–03.00**

*Edmund Joensen, løgmaður aftaná skeið umborð á Teistanum og vitjan í Lopra:*

# Ein lærurríkur dagur

***– Hetta hevur verið ein áhugaverdur og lærurríkur dagur. Eg fari nú at leggja størri orku í at kunna meg við hesa nýggju vinnu sigur Edmund Joensen, løgmaður eftir at hava verið á skúlabonki umborð á Teistanum og at hava vitjað á boriplássinum í Lopra allan mikudagin. Sosialurin var í hølunum á løgmanni og teimum mongu umboðunum frá oljufyrisiting oø., sum vóru við til hetta heldur óvanliga men ikki sørt áhugaverda tiltak.***



*Ein forvitin Edmund Joensen, løgmaður hyggur niður í borholið í Lopra*




*Tær triggjar Herfríð, Wenche og Kristina hava vant seg við nýggja arbeiðsplássið uttan fyri bygdina*

JAN MÜLLER

Har vóru tey øll, sum onkursvegna hava tilknýti til eina komandi føroyska oljuvinnu. Frá løgmanni, sum umsitur undirgrundarmál í landsstýrinum til skrivstovufólkini á oljufyrisitinginI, sum dagliga hava nóg mikið at gera við at taka ímóti telefonsamrøðum frá útlendskum oljufólkum, ið ynskja at vitja hendan vegin.

**Á skúlabonki umborð á Teistanum**

Tey mundu vera eini 40 í tali, sum mikumorgunin fóru við Teistanum til Suðuroyar. Veðrið var av tí allar besta, so útlit vóru fyri at uppliva Suðuroynna, tá hon er vakrast. Og so varð. Eftir at Martin Heinesen umborð á Teistanum hevði greitt frá upphavi Føroya og jarðfrøði annars og Alex Buvik hevði kunnað luttakararnar um oljuboring, varð farið beina leið til Lopra, har stóra bortornið Rig 81 hjá Mærsk Contractors stendur og borar djúpt niður í føroysku undirgrundina, so djúpt sum eingin áður hevur verið.

Í ferðalagnum vóru starvsfólkini á Oljufyrisitinginí, limirnir í Oljuráðleggingarnevndini, løgmaður og løgmansstjórin umframt limirnir í sokallaðu „Aktiónsnevndini" í Lopra. Hetta eru umboð fyri løgregluna, sjúkrahúsverkið, Brunaumsjónina, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Sumbiar kommunu, Vaktar- og Bjargingartænastuna o.a. almennar stovnar. Arbeiðið hjá nevndini er at standa fyri ansingini á boriøkinum og rundan um tað. Tess bæði at vera við til at fyribyrgja eina vanlukku og at minka um avleiðingarnar hendir ein slík kortini.

Girðing er rundan um alt boriøkið, soleiðis at óviðkomandi ikki skulu órógva arbeiðið.

**Petur Nolsøe tók ímóti**

Við portúrið tóku Petur Nolsøe, sum er samskipari á boriplássinum og Mark Rechensky, geofysikari hjá Danop, ímóti. Øll tey vitjandi vórðu innskrivað og fingu síðani trygdarhjálm og trygdarstivlar.

Luttakararnir vórðu síðani vístir rundt á hesum fyri føroyingar heilt óvanliga men ikki sørt forvitnisliga arbeiðsplássinum og fingu har eina rættiliga gjølliga frágreiðing um arbeiðsgongdina og ta tøknifrøðina, sum verður brúkt í sambandi við boringina.

Eftir vitjanina spurdu vit Edmund Joensen, løgmann, hvat hann hevði fingið burtur úr hesum heldur óvanliga arbeiðsdegi sínum?

**Fari at prioritera oljuøkið hægri**

Undirgrundin og ein møgulig komandi oljuvinna eru í dag mítt málsøki, og eg havi sett mær fyri at prioritera hægri tað, sum hevur við eina møguliga komandi oljuvinnu at gera – so høgt sum tað nú ber til.

Tað er við hesum í huga at eg gleðiliga havi tikið av hesum frálíka tilboðnum frá Oljufyrisitinginí um at kunna meg um jarðfrøðina og annars tað, sum fer fram í praksis, tvs. tann tøknifrøðin, sum verður brúkt í sambandi við bæði boring o.a.

Løgmaður sigur, at talan er fyrst og fremst um vitan og tøknifrøði, og hetta hevur ein sum politikari og sum umsitari av málsøkinum í Tinganesi avgjørt brúk fyri at fáa innlit í.

Løgmaður heldur fyri, at dagurin, bæði umborð á Teistanum og á boriplássinum í Lopra hevur verið rættiliga lærurríkur – sum eitt byrjunarskeið serstakliga fyri tey, ið skulu arbeiða í eini møguligari komandi oljuvinnu í Føroyum.

**Før at kunna seg við oljuvinnu aðrastaðni**

Hetta er so bara eitt stig. Eg fari nevniliga nú at gera meira við at kunna meg við oljuídnaðin bæði í Noregi, Skotlandi og aðrastaðni, sum so kann brúkast á okkara leiðum. Tað er neyðugt, um tú skal taka støðu politiskt, at vita nakað um vinnuna, bæði hvat jarðfrøði, tøknifrøði og ikki minst hvat tí handilsliga partinum viðvíkur, tí tað eru jú pengar til tað føroyska



*Petur Nolsøe, ið tekur sær av samskipanini oø. á arbeiðsplássinum og sum her tekur ímóti Edmund Joensen, løgmanni, veit altíð eina góða*

*Boriplássið í Lopra*



samfelagið tað snýr seg um í síðsta enda.

Løgmaður sigur, at nú ræður um ikki at gera somu mistøk sum aðrir, eitt nú norðmenn hava gjørt.

Tað er óneyðugt. Vit eiga at læra av tí, taka tað besta burtur úr og solda frá, soleiðis at ein sleppur undan at gera mistøk, sum ein kann kalla nýbegynnarafeilir.

Løgmaður vísir á, at vit hava eisini royndir frá Hetlandi og eiga vit somuleiðis at læra av skotum, tí tað eru teir sum í praksis arbeiða við olju tætt við okkara mark - á dýpum, sum vit rokna við líkjast teimum, har vit skulu arbeiða í framtíðini.

Løgmaður leggur afturat, at eisini danir hava drúgvar royndir í oljuvinnu og eiga vit so sanniliga eisini at samstarva við teir og læra av teirra royndum.

## Gott arbeiðsplass

Edmund Joensen heldur at tað var [illegible] áhugavert at vitja á boriplássinum í Lopra [illegible]. Hann sigur, at tað [illegible] stórt og [illegible] arbeiðspláss [illegible] fullkomið arbeiðspláss [illegible] væl skipað við góðum trygdarskipanum og annars góðum handverki allan vegin ígjøgnum.

Hóast limirnir í ferðalagnum ikki fingu nakað ítøkiligt at vita frá borifólkunum á staðnum, um hvørjar nýggjar upplýsingar fingnir eru upp úr undirgrundini,



*Fráløra í oljuvinnu og jarðfrøði umborð á Teistanum*

so sigur løgmaður seg vera sera spentan um at fáa úrslitið av hesi boring, tvs. um og hvat borikjarnurnar fara at siga okkum um tjúkdina á basaltinum.

Tað hevði verið spennandi at fingið staðfest, at vit koma niður um basaltlagið og koma niður í upprunabotn, sum ein heldur kann goyma bæði gass og olju sigur Edmund Joensen.

-Men tað svarið fekk løgmaður ikki undir vitjan síni leggur hann smábrosandi afturat. Men hann heldur tað vera spennandi at vita, hvat úrslitið verður, tá liðugt er at bora.

Um løgmaður kortini hevur fingið nakað ítøkiligt at vita, so er greitt, at hann fer ikki at almannakunngera tað nú. Tey møngu oljufeløgini, sum liggja boriæt-



*Alex Buvik, trygdarráðgevi hjá Oljufyrisitingini væl nøgdur við uppmótingina til skeiðið*

lanina, hava ynskt, at upplýsingar um boringina í hvussu er fyribils bert skulu vera í varðveitslu hjá teimum sjálvum og føroyskum oljumyndugleikum.



*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini, Árni Olafson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini og Súsanna Danielsen, fulltrúi í landsstýrinum í oljumálum í trygdarhjálmum og serstøkum búnum á boriplássinum*

*Løgmaður samdur við formanni í Ráðgevandi Nevnd*

# Oljan ikki álitið men eitt gott ískoyti



Martin Heinesen, jarðfrøðingur kannar nakað av smágrúsinum, sum er komið upp við borikjarnunum

*-Finna vit olja, og tað vóni eg vit gera, so skal hon vera nakað, sum kemur aftrat tí náttúrliga og endurnýggjandi tilfeinginum sum fiskurin er. Vit mugu so eisini umsita eitt møguligt komandi oljuríkidømi á slíkan háttan, at tað kemur øllum tí føroyska samfelagnum til góðar og har eisini okkara eftirkomarum sigur løgmaður á heimferð eftir vitjan á boriplássinum í Lopra*

**Fiskurin álitið**

Á veg norður aftur við Teistanum varð aftur fyrilestur um oljuvinnu, men stundir vóru eisini at hoyra útvarpið. Har var samrøða við nýggja formannin í Ráðgevandi Nevndini, sum helt fyri, at føroyingar eiga ikki at taka tað sum givið at olja er her og gera stórar íløgur longu nú í eina slíka vinnu. -Tit mugu ikki byggja út í samfelagnum uppá, at olja finst. Kemur tað hartil eināferð, at olja verður funnin, so skal tað til ta tíð verða tikið sum nakað gott segði formaðurin í nevndini.

Løgmaður er ikki ósamdur við danska búskapar-frøðingin.

-Eg havi alla tíðina havt somu støðu, at vit skulu innrætta føroyska samfelagið eftir tí tilfeingi, sum endurnýggjar seg tvs. fiskin, fiskiríkidømi og annað náttúrligt virksemi, sum føroyska samfelagið kann hava.

**Mugu hugsa um eftirkomararnar**

So finst olja her, og tað vóni eg, so skal tað vera nakað, sum kemur aftrat. Vit hava altíð sagt, at er munandi av olju í undirgrundini, so er tað nakað, sum vit hava skyldu til at umsita væl fyri okkara eftirkomarar eisini. Vit kunnu ikki bara bruka alt her og nú og alt so erhiðugt um eini 20-30 ár. Hetta ríkidømið skal umsitast á ein slíkan hátt, at tað kemur tí føroyska samfelagnum til góðar og eftirkomarunum eisini.

Sosialurin hevur roynt at fregnast, hvussu gongst í Lopra, men torført er at fáa nakað neyðugt at vita.

**Kunnu einki upplýsa**

Arne Rosenkrands Larsen hjá Dong sigur, at boringin nú koyrir sum hon skal. Hann vil ikki upplýsa, hvussu langt niður teir eru komnir, tí hetta eru fortroligar upplýsingar, sum bert oljufeløgini, sum liggja ætlanina og føroysku myndugleikarnir fáa. Hann kann tí ikki upplýsa antin teir eru komnir niður gjøgnum basaltið ella ikki.

Annars vónar hann, at teir ikki fara at hava fleiri óhapp. Nakað hevur verið higartil, men slíkt kann ein illa verja seg heilt móti. Boringin heldur nú fram til inn í september mánað.

Talan er at bora niður á 3500 metrar. Botnurin á tí gamla holinum var góðar 2000 metrar og hevur Sosialurin skilt - tað hava vit tó ikki fingið váttað - at borurin seint í hesi vikuni var komin niður á umleið 2380 metrar tvs. einar 20 metrar longu niður enn júst tað staðið í løgunum, har seismiskar kanningar hava víst eina ella aðra broyting.



Fleiri føroyingar arbeiða sum borifólk á pallinum. Hans (í miðjuni) er ein teirra



**Lach, Bókhald og grannskoðan**

v. Børge Christiansen, cand merc aud
skrásettur grannskoðari
í Heiðum, 370 Miðvágur
Tlf 33498 · Telefax 33490

Bókhald | Roknskap
Grannskoðan | Ráðgeving

Jeg har klienter både på Vagar, Streymoy og Eysturoy!

Jeg reviderer, udarbejder budgetter og årsregnskab, bogfører, rådgiver indenfor skat, markedsføring, bogføring, finansiering, beskatning, økonomisk styring m.m.

Jeg giver gerne et tilbud, hvis I ønsker det!

**ALOE VERA**



*til betri húðrøkt*

Virðismett í túsundir av árum sum holdsviðgerðar- og lekievni og enduruppdagað fyri sín einastandandi mátt av sjálvum Carl von Linne, einum av heimsins fremstu náttúruvísindamonnum nakrantíð

**Nýtt vakurt hold**

Luftskiftið í holdinum, sum trupulleikar standast av, verður bøtt um við ALOE VERA, sum eisini stórliga skundar undir nýgerð av holdinum og virkið lekir aðrar holdssjúkur, eitt nú elvdar av alskyns óheppnari geisling, og brunaskaðar.

70% ella meira av reinum ALOE VERA eiga at vera í viðgerðarevnum av hesum slag. Hetta tryggjar framleiðarin JASON, sum av góðum grundum eigur størsta amerikanska marknaðarpartin í dag.

**ALOE VERA** frá **JASON** fæst sum
VÆTUKREM (moisturing creme),
BODY LOTION,
ALOE VERA SATIN SOAP,
ALOE VERA SHAMPO &
ALOE VERA COOLING GEL 98%

*Fæst hjá*

**NATEN®**
**søla (Føroyar)**
v/ Anne Mari Samuelsen

**Tlf. 18649**
**83649**
**11644**